# Føroya Banki fyrireikar at selja ognarlut í Bakkafrost

Partaeigararnir í størstu alifyritøkunum í Føroyum, Bakkafrost og Vestlax, hava avtalað, at feløgini leggja saman frá 1. januar 2010. Samstundis er farið undir fyrireikingarnar at skráseta samanlagda felagið á virðisbrævamarknaðinum í Oslo næsta ár. Í sambandi við skrásetingina ætlar Føroya Banki at selja sín ognarlut á 33 prosent í samanlagda felagnum

Føroya Banki eigur í løtuni ognarlutir í bæði Bakkafrost og Vestlax, og tá feløgini eru samanløgd 1. januar 2010, verður ognarlutur bankans í samanlagda felagnum 33 prosent. Samanleggingin er treytað av góðkenning frá viðkomandi myndugleikum.

Hóast partabrævakursir um allan heim hava verið fallandi seinasta árið, hevur gingið væl við partabrøvum hjá alifyritøkum, ið eru skrásettar á virðisbrævamarknaðinum í Oslo. Kursirnir eru nógv hækkaðir, og nógv bendir tí á, at løtan er tann rætta at skráseta samanlagda føroyska alifelagið á norska virðisbrævamarknaðinum.

„Ætlanin at selja okkara ognarlut í samanlagda felagnum er ein natúrlig avleiðing av bankans strategi um at leggja dent á bankavirksemi og minka um váðan í einstøkum vinnugreinum. Vit halda tað eisini vera týdningarmikið, at skapt verður eitt fíggjarliga sterkt alifelag í Føroyum, sum er kappingarført á altjóða marknaðinum," sigur Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banka.

Í sambandi við ætlaðu skrásetingina á virðisbrævamarknaðinum í Oslo hava Bakkafrost og Vestlax gjørt avtalu við Corporate Finance-deildirnar hjá Føroya Banka og Nordea um at standa fyri børsskrásetingini.

# Bakkafrost og Vestlax leggja saman

**Partaeigararnir í teimum báðum størstu alifyritkunum í Føroyum hava skrivað undir avtalu um at leggja feløgini saman frá 1. januar 2010**



Samstundis er farið undir fyrireikingar at skráseta samanlagda felagið á virðisbrævamarknaðinum í Oslo næsta ár.

Bakkafrost skipaði í 2006 saman við Havsbrún og Føroya Banka nýggja alisamtakið Bakkafrost Holding í Norðoyggjum og syðra parti av Eysturoynni. Aðalmálið við felagnum var at bøta um møguleikarnar at skipa eina burðardygga aling í Føroyum. Bakkafrost Holding hevur staðið seg væl hesa tíðina og virkar nú á fjórða ári við fullari framleiðslu í øllum liðum.

- Á marknaðinum fyri laksráða stórar handilsketur, ið leggja dent á at gera avtalur um stórar nøgdir í senn. Vit meta tað vera ein avgjørdan fyrimun, at samanlagda felagið verður ein stór eind, tí tá verður lættari at handla við alsamt vaksandi kundarnar, siga Líggjas í Bø, nevndarformaður í Bakkafrost Holding, og Bergur Poulsen, nevndarformaður í Vestlax.

Samanleggingin av Bakkafrost og Vestlax verður veruleiki 1. januar 2010. Partarnir vænta, at eyðsýndir fyrimunir verða við samanlagda felagnum, tí talan verður um eitt spennandi arbeiðspláss, har orka eisini verður til vørumenning, marknaðarmenning og nýhugsan.

- Við færri eindum í alivinnuni ber betri til at stýra ymsu økjunum í vinnuni, og hetta er umráðandi fyri at avmarka lívfrøðiliga váðan. Við skrásetingini á virðisbrævamarknaðinum í Oslo fer almenningurin at kunna vera við í eigaraskarðanum í felagnum og fáa ágóða, um væl gongst í hond, siga Líggjas í Bø og Bergur Poulsen.

Bakkafrost og Vestlax hava gjørt avtalu við Corporate Finance-deildirnar hjá Føroya Banka og Nordea um, at deildirnar báðar standa fyri at fyrireika børsskrásetingina í Oslo.

Ætlanin umn samanleggingina er treytað av myndugleikagóðkenning, siga feløgini í tíðindaskrivi.


Skráin fyri Rás2

Mikudagur 15. juli
15:00 Tíðindi
15:10 Vágspop – Heri Jacobsen, Barbara Holm og Mirjam Pætursdóttir eru vertir
16:00 Tíðindi
16:10 Vágspop
17:00 Tíðindi
18:30 Tíðindi (e)
19:00 Tónleikur
20:30 Tónleikur
21:00 Úr skjáttuni – Evni: Um Bíbliuna. Ejvind Mouritsen prátar við Berg D. Joensen (3. partur)
22:00 Tónleikur
00:00 Liðugt

Hósdagur 16. juli
07:00 Tónleikur
09:00 Morgunsending
10:00 Lýsingar
10:05 Morgunsending
11:00 Tíðindi
11:05 Morgunsending
12:00 Tíðindi
12:15 Hitt-tónleikur
13:00 Ynskiløtan
14:00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan
15:00 Tíðindi
15:10 Seinnapartssending
16:00 Tíðindi
16:05 Seinnapartssending
17:00 Tíðindi
17:15 Seinnapartssending
18:30 Tíðindi (e)
18:50 Tónleikur
21:15 Tónleikur
00:00 Liðugt

Fríggjadagur 17. juli
07:00 Tónleikur
08:00 Bilradio (e)
09:00 Morgunsending
11:00 Tíðindi
11:10 Morgunsending
12:00 Tíðindi
12:15 Hittónleikur
13:00 Ynskiløtan
15:00 Tíðindi
15:10 Seinnapartssending
16:00 Tíðindi
16:05 Seinnapartssending
17:00 Tíðindi
17:15 Seinnapartssending
18:30 Tíðindi (e)
18:50 Tónleikur
21:00 Tónleiksending hjá Heimamissiónini
22:00 Tónleikur
00:00 Liðugt

RÁS ...títt radio

SMS kapping

Eitur optikarin í Miðlon Niels L. Arge? Send SMS til 1940 og svara ja ella nej. Hvønn dag kappingin er, kanst tú vinna eitt gávukort á kr. 500,- til eina av matstovunum í Havn.



